Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erling Eidesgaard, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Íverksetarafeløg

Spurningar:
1. Hvussu eru royndirnar í Føroyum við íverksetarafeløgum?
2. Hvussu nógv íverksetarafeløg eru í Føroyum í dag?
3. Hvussu nógv íverksetarafeløg eru farin á húsagang (síðan 1. januar 2017)?
4. Hvussu stóra skuld høvdu hesi íverksetarafeløg til ávikavist tað almenna og til privatar kreditorar, tá tey fóru á húsagang?
5. Hvussu nógv partafeløg og hvussu nógv smápartafeløg, ávikavist, eru í Føroyum í dag?
6. Hvussu nógv partafeløg og hvussu nógv smápartafeløg, ávikavist, eru farin á húsagang (síðan 1. januar 2017)?
7. Ætlar landsstýrismaðurin, at tað framhaldandi skal vera gjørligt, við 1. kr. í kapitali, at stovna íverksetarafeløg í Føroyum?

Viðmerkingar:
Frá 1. januar 2017 hevur tað verið møguligt, við 1 kr. í kapitali, at stovna sokallaði íverksetarafeløg í Føroyum. Endamálið var at stimbra íverksetan, og helst hevur fyrimyndin verið líknandi skipan í Danmark, ið tá hevði verið í gildi síðan 1. januar 2014.

Danska stjórnin gjørdi tó av, í februar 2019, at steðga hesum aftur, eftir at ein frágreiðing hjá danska Erhvevsstyrelsen, í september 2018, staðfesti, at íverksetarafeløgini í størri mun enn aðrir partafelagsformar blivu brúkt til undandrátt, og at feløgini settu seg í skuld, fyri síðani at fara á húsagang. Sostatt mistu bæði landið og privatir kreditorar lutfalsliga meira pening uppá íverksetarafeløg enn uppá aðrar partafelagsformar.

Í frágreiðingini hjá danska Ervhervsstyrelsen í september 2018 stóð m.a. at lesa:
"Analysen viser blandt andet, at antallet af tvangsopløsninger efter introduktionen af iværksætterselskaber er steget mere, end hvad der var forventet. Desuden var der usikkerhed om selskabsformen ville blive brugt til svig og momsunddragelse i videre udstræk end andre virksomhedsformer. Analysen viser hertil, at iværksætterselskaberne i større omfang end forventet har medført en forhøjet risiko for svig, og at skatte- og afgiftsrestancerne for iværksætterselskaberne er næsten dobbelt så høje som enkeltmandsvirksomheder."

Á Løgtingi, 7. mars 2023

Erling Eidesgaard